# Her fæst alt á einum staði

**- Jú, tað er strævið at reka ein handil í dag. Men tað ber hóast alt til, sigur Hervør Hansen, sum rekur Matvørubúðina í Nólsoy.**

HANDIL
*Orð/mynd: Snorri Brend*



*Birita Petersen hevur arbeitt í handlinum í eina tíð*

**Nólsoy:** At hava handil í heimbygdini er ikki nÝtt fyri Hervør.

Abbi hennara byrjaði á sinni við handli, sum pápi hennara síðani yvirtók.

Og Hervør hevur tí alla tíðina kunnað fylgt við, hvussu handilin hevur ment seg so líðandi.

Herfyri bar tað so til, at Hervør tók yvir raksturin av hesum handlinum.

- Ja, tú kanst spyrja, hví eg tók yvir handilin eftir pápa mín.

Men tey vóru vorðin eldri, og nú var ynski um at eitt nýtt ættarlið tók við, sigur Hervør Hansen.

Hon tók so hetta stigið, og gjørdist fyrr í summar eisini limur í søluketuni hjá Samkeypi.

Kundarnir fáa tí eisini lut í teim somu tilboðunum sum aðrir Samkeyps-kundar hava. Og tað er ikki frítt, at ein eisini sær fólk ganga við teim eyðkendu gullittu posunum hjá ketuni.

### Eitt stað

Hóast Matvørubúðin í Nólsoy húsast í avmarkaðum hølum, so sæst hetta ikki aftur í úrvalinum av vørunum.

Her fæst nevniliga ein stórur partur av teim dagligu vørunum, sum eitt húski hevur brúk fyri. Men her finst eisini so mangt annað.

Ein skal ikki hava hugt seg leingi um, fyrrenn ein sær, at her er nærum alt at fáa á einum og sama staði - frá nálum til penslum, eins og gávulutir og annað í hópatali.

Umframt alt hetta so virkar handilin eisini sum eitt sølustað av teimum vørunum, sum fáast til handkeyp í einum apoteki. Og haraftrat er Matvørubúðin eisini sum ein Snarskiva fyri Tórshavnar kommunu, har m.a. faldarar og annað kunnandi tilfar í tí sambandinum liggur frammi.

Men tað er kortini fyrst og fremst matvørurnar, sum fólk koma inn í handilin at keypa.

Í bygdini búgva omanfyri 250 fólk, men um summarið vitjar rættiliga fitt tal av ferðafólki í bygdini.

At ferðafólkini eru her, sæst sjálvandi eisini aftur hjá okkum, sigur Hervør.

# Skulu trúgvandi menn líkjast Schwarzeneger

**Heimamissiónin:** Vikuskiftið 3. til 5. februar verður skipað fyri fyrstu beinleiðis mansleguni hjá hesi missiónsrørsluni. Tiltakið verður í Gjáargarði norðuri við Gjógv.

Á leguni verða nógv spennandi evni tikin upp sum eru viðkomandi fyri mannfólk. Og tí verður sjálvandi vónað, at legan verður fullteknað.

Byrjað verður fríggjakvøldið við evninum um samleikan hjá mannfólki. Her verður m.a. nortið við, um allir menn skulu líkjast Arnhold Schwarseneger?

Morgunin eftir verður lagt til brots við at býta luttakararnar sundur í teir giftu og teir ógiftu. Hetta verður gjørt í sambandi við undirvísingina um ábyrgdina hjá manninum í heiminum, kirkjuni og í samfelagnum. Her verður eisini nortið við, hvussu ein góður maður ella pápi eigur at vera.

Um kvøldið verða freistingarnar tiknar fram, sum kunnu møta monnum í dag. Her verður serliga hugsað um girnd, pening og vald. Seinnapart sunnudag endar so henda legan.

Henda fyrsta manslegan hjá Heimamissiónini vendir sær til menn sum eru umleið 20 ár og til teir sum eru um 45 ár.

Undirvísarar á mansleguni verða sóknarpresturin, Bergur D. Joensen og Trev Gregory, sum hevur verið tríggjar ferðir í Føroyum áður. Hann er væl kendur av ungum føroyingum, tí hann hevur skipað fyri stórum kristnum ráðstevnum, har fleiri føroyingar hava verið við tey seinnu árini, m.a. vóru 140 føroyingar við á eini av hesum legunum í Týskalandi.

**sb.**




*Gjáargarður verður karmur um fyrstu mansleguna hjá Heimamissiónini*

# Íblástur til andlitsrøkt av krabbasjúkum kvinnum

**Krabbamein:** Mánadagin 23. januar Krabbameinsfelagið øllum røktarstarvsfólkum, sum eru um kvinnur, sum eru raktar av krabbameini, á skeið í húð- og andlitsrøkt, og hvussu ein leggur make-up.

Á hesum skeiðnum er ætlanin at geva hugskot, íblástur og hjálp til at stuðla, vegleiða og hjálpa hesum raktu kvinnunum at varðveita útsjóndina og kenna seg væl.

- Vit vita, at krabbameinsviðgerð við t.d. kemoterapi og strálum ávirkar útsjóndina, og er við til at geva eina broytta kroppsuppfatan.

- Hetta kann hava við sær, at kvinnan møguliga kennir seg meira sjúka, enn hon í veruleikanum er, vísir felagið á.

Kanningar runt um í heiminum vísa eisini, at fleiri kvinnur, sum eru raktar av krabbameini, og sum fáa eftirviðgerð við kemoterapi og strálum, styrkja sjálvsálitið um tær fáa upplæring og undirvísing í at røkta teirra útsjónd við góðari húðrøkt og make-up.

- Hetta ger eisini at tær kenna størri vælveru. Í teimum førum har kvinnan ikki hevur orku til at taka sær av hesum sjálv, hevði tað verið ynskiligt, at røktarstarvsfólkið hevði førleika og vísti áhuga í at hjálpa og ráðgeva við hesum, vísir felagið á.

Undirvísari á skeiðnum verður Elsa í Garði, kosmetologur. Nevnast kann, at eitt líknandi skeið sum hetta verður hildið í februar mánaði fyri kvinnur við krabbameini.

**sb.**